

*Um knappan mánaða er fótbólturin farin í vetrarfrí, men tað sama er ikki galdandi fyri umsitingina. Tvørtur ímóti, so tykist veturin í ár at verða ein sera strævin tíð hjá Ísaki Mikladal og umsitingini í FSF sum heild*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Stórar broytingar ávegis

**31. mai komandi ár, skulu allar reglugerðir hjá føroyskum fótbólti samsvara við tær hjá FIFA. Longu nú arbeiðir umsitingin av fullari kraft við málinum, sum møguliga endar við, at alt lógarverkið innan fótbóltin snøgt sagt verður skift út**

FÓTBÓLTSREGLUR
*Jákup Mørk*

Hóast spælið á vøllinum nú er um at vera liðugt fyri í ár, so er tað ikki so, at fótbólturin fer fullkomuliga í vetrarfrí. Og so langt ífrá, kundi verið lagt aftur.

Veturin er vanliga tíðin, har umsitingin í FSF fyrireikar tær kappingar, sum eru fyri framman í komandi kappingarári. Onkra tíð standa tillagingar av lógum og reglum eisini á skránni, og ikki minst hetta seinasta hevur kravt nógv arbeiði seinnu árini, nú UEFA hevur ásett, hvørji minstukrøv til fótbóltin skulu lúkast.

## Standard-reglur

Eisini í vetur verða nakrar dagføringar í hesum, men fyrst og fremt, so verður setningurin í vetur at fylgja nýggjum FIFA-ásetingum.

Á fundi í fjør viðtók FIFA nevnliga, at allar reglugerðir hjá øllum fótbóltssambondum í heiminum skulu standardiserast, soleiðis at hesar eru at kalla eins kring allan knøttin.

Fyrst og fremst, so vilja tey í FIFA, at øll tey umsitingarligu viðurskiftini kring fótbóltin skulu vera at kalla einsljóðandi kring allan knøttin. Í hesum liggur so eisini, at reglur, málsviðgerð og kærumøguleikarnir skulu vera einsljóðandi hjá øllum limalondunum. Og ikki minst, so vil FIFA við hesum eisini sleppa sær undan, at trætumál innan fótbóltinj verða avgjørd í sivilum rættarmáli. Tað skal snøgt sagt verða fótbóltsfamiljan, sum skal taka støðu til allar spurningar, og í evstu løtu verður tað so altjóða ítróttardómstólurin í Lausanne, sum kemur at standa við valdinum. Skal tað lata seg gera, er eisini neyðugt við einsljóðandi reglum, tí tað nyttar lítið við eini slíkari mannagongd, um grundarlagi undir rættarligu avgerðunum verður broytt, so hvørt sum málið verður flutt longur upp í skipanini.

## Skifta kanska alt

Fyri Føroyar hevur tað verið Ísak Mikladal, aðalskrivari, sum hevur havt mesta samskiftið við FIFA um málið, og hann sigur, at hetta er nakað, sum FSF hevur vitað av í eina tíð.

- Sjálvt um talan neyvan verður um tær heilt kollveltandi broytingarnar fyri skipanina av føroyskum fótbólti, so eru nógv ting, sum skulu regulerast ella ajourførast nakað. Í seinasta lagi 31. mai komandi ár skal FIFA hava móttikið nýggju lógirnar hjá okkum, so tað er einki at ivast í, at vit hava nokk at takast við komandi tíðina. Stóri spurningurin í so máta er kanska, hvørt tað yvir høvur loysir seg hjá okkum at fara at tillaga okkara reglugerðir, ella um snøgt sagt skulu umseta tær standard-reglur, sum FIFA hevur latið gjørt. Ella snøgt sagt samtykkja eitt heilt nýtt lógarverk.

- FIFA hevur jú í longri tíð arbeitt við hesum. Teir hava eitt veldugt lið av sakførarum, sum við atliti til allar hugsandi reglugerðir hava evnað standard-reglurnar til, og við at kopiera teirra lógarverk, eru vit í øllum førum vísir í, at alt er í samsvari við krøvini. Hjá okkum hevur støðan jú verið tann, at vit hava eitt lógarverk, sum grovt sagt er óbroytt síðani 1979. Sjálvandi eru tillagingar og broytingar gjørdar á vegnum, men hesar hava mest sum hvørja ferð verið av neyð - skilt soleiðis, at tað eru mál av ymsum slag, sum hava skundað undir hesar. Fáa vit eitt nýtt lógarverk, so eru vit at kalla upp á forkant við reglurnar og tey krøv, sum verða sett í framtíðini, sigur aðalskrivarin.

## Feløgini alt at siga

Og tað verður so ikki bara sum at siga tað, nú eitt heilt nýtt lógarverk fyri føroyskan fótbólt skal setast í verk.

Sjálvandi er tað FIFA, sum staðfestir, hvørji krøv limalondini skulu lúka, men tað eru fyrst og fremst føroysku feløgini, sum skulu gera av, hvørt lógirnar yvir høvur skulu broytast.

Forumið, sum hetta skal gerast á, er sjálvandi aðalfundurin, sum verður hildin seinast í februar mánaði, men áðrenn tað er komið somikið langt, má fótarbeiðið gerast.

Tí hevur FSF gjørt av, at tey tann 5. november fara at hava fund við formenninar í øllum teimum føroysku fótbóltsfeløgunum. Her sleppa hesir so at viðgera málið saman við nevndini, og síðani verður málið aftur tikið upp á árliga fundinum við feløgini, sum verður tann 19. november. Vónin er so, at semja er fingin um leistin til ta tíð, soleiðis at umsitingin eftir hetta kann gera eitt liðugt tilevnað uppskot til aðalfundin.

# Hvussu við ÍSF

Hóast tað ikki hevur fyri nakran aðalfund enn, so er helst lítið at ivast í, at føroysku fótbóltsfeløgini velja at ganga undir FIFA-reglurnar, sum nú verða kravdar. Í øllum førum í longdini verður hetta treytin fyri at verða partur av altjóða fótbóltsfamiljuni, og tí hevur føroyskur fótbóltur neyvan nakað val í so máta.

Tað reisir tó samstundis spurningin, hvussu tað framyvir verður við leiklutinum hjá ÍSF mótvegis fótbóltinum.

Í øllum førum verður tað neyðugt, at fótbólturin fær sersømdir frá ÍSF, ella at reglurnar fyri ÍSF verða broyttar, um fótbólturin framhaldandi skal vera partur av hesum. Tað er nevnliga í lógunum hjá ÍSF álagt sersambondum at akta og lýða lógir ÍSF's. Sum heild man ikki vera nakar trupulleiki í hesum, men skal føroyskur fótbóltur ganga undir FIFA-krøvini, so verður tað altso í fyrsta lagi FIFA-lógir og í øðrum lagi ÍSF-lógir, sum føroyskur fótbóltur kemur at ganga undir. Og tað kann hugsast at geva nakrar áhugakonfliktir í framtíðini.

Tað kemur tó neyvan upp á tal, at FSF bara uttan víðari meldar seg úr føroyska ítróttarheiminum her og nú. Meira sannlíkt tykist tað vera, at nakrar dagføringar verða gjørdar í reglunum hjá ÍSF, soleiðis at hesi eisini loyva støðuni, sum FSF kemur í, um ella tá nýggju FIFA-krøvini verða eftirlíka.

**-mørk**

# Ynskja størri samvirkni við feløgini

Heldur enn bara at vera lóggevandi parturin í føroyskum fótbólti, so arbeiðir FSF í løtuni við ætlanum um, at felagsskapurin í framtíðini kann gerast ein meira aktivur samstarvsfelagi hjá teimum, sum fáast við fótbólti.

- Tú kanst siga, at tað í nógvar mátar virkar, soleiðis at vit mest sum altíð eru tann, sum kemur við peikifingrinum, og tað kann gerast eitt sindur irriterandi fyri allar partar, sigur Ísak Mikladal.

- Í so máta vildi tað verið munandi betri, um vit kunnu samstarva við feløgini og vera við til at samansjóva virksemið millum hesi.

- Her hava vit í fyrstu atløgu hugsað um, at vit kundu skipað fyri nøkrum skeiðum, ella kanska bara forumum fyri ymsu málbólkarnar. Tað kundi til dømis verið fyri ábyrgdarfólki av ymsum slag, so sum trygdarumboð, samskiparum og øðrum. Á tann hátt kundu vit kanska í fyrsta lagi verið við til at givið hesum nýggjar impulsir og kanska greiðari leiðreglur innan ymsu økini, eins og tað eisini gjarna skuldi viðført, at kontaktnetið hjá hesum varð víðkað. Hetta skilt soleiðis, at vit tá kundu virka til at knýtt betri bond millum ymsu feløgini á fleiri økjum, og tað trúgvi eg vil koma øllum pørtum til góðar, sigur Ísak Mikladal.

**-mørk**

# FM fyri Feløg í Vági

**Komandi vikuskifti verður FM fyri feløg í bridge leikt í Bridgehúsinum í Vági. Kappingin hevur verið spæld í Vági tey seinastu árini, har hon hevur verið framúr væl fyriskipað**

BRIDGE
*Bogi Simonsen*

Kappingin er soleiðis háttað, at hvørt bridgefelag, ið er limur í Føroya Bridgesambandi, kann senda eitt lið til kappingina. Spældur verður ein dystur móti hvørjum av hinum liðunum.

Hóast Eysturoyar Bridgefelag áður ofta hevur verið at meta sum favorittur til at vinna kappingina, mugu teir nokk vænta at fáa sterka mótstøðu frá liðnum frá Bridgedeild Kaggans, ið vann kappingina í fjør.

Á liðinum, sum vann í fjør vóru Bogi Simonsen-Símin Lassaberg og Hans Jacob Petersen-Hallberg Arnfríðsson

Feløgini, sum eru umboðað hesaferð, eru Bridgedeild Kaggans, Havnar Bridgefelag, Nýggja Bridgefelag, Eysturoyar Bridgefelag, Klaksvíkar Bridgefelag, Tvøroyar Bridgefelag og Vágs Bridgefelag.

Kappingin byrjar fríggjakvøldið áleið kl. 22:00, alt eftir nær Smyril leggur at.